# Búfólkið skal kenna seg sum heima

**Av tí at okkurt brot manglaði í greinini í gjár, prenta vit hana umaftur.**

MENNINGARTARNAÐ
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Ì gjár kundi fyrsta búfólkið flyta inn í nýggja bústovnin og sambýlið fyri menningartarnað og fólk við autistiskum breki í Klaksvík.

Hesin stovnur er úrslitið av einum arbeiði, ið hevur verið í gongd líka síðani á heysti í 1997.

Stovnurin er í tveimum, har tann eini parturin er eitt sambýli, sum kemur at húsa seks menningartarnaðum. Hin parturin er ein bústovnur við plássi fyri fýra børnum og ungum, sum bera brekið autismu.

Munurin á sambýlinum og bústovninum er, at tey menningartarnaðu í sambýlinum í ein vissan mun eru før fyri at klára seg sjálvi, eins væl og tey eisini sjálvi skulu gjalda húsaleiguna. Hinvegin kemur landið at gjalda uppihaldið hjá teimum, ið skulu búgva á bústovninum.

Øll búfólkini fáa eina íbúð hvør, sum tey so sjálvi koma at innrætta eftir egnum ynski.

Ì hesi íbúð er køkur, baðirúm og stova og kamar í einum.

Hetta er einasti stovnur í landinum, ið kann bjóða búfólkinum eina heila íbúð at húsast í.

Allar íbúðirnar eru eins bygdar, men tó eru tað einans íbúðirnar í sambýlinum, ið hava køk. Hetta tí at búfólkini við autistiskum breki sum oftast ikki eru eins væl fyri og tey menningartarnaðu.

– Vit valdu at gera íbúðir heldur enn kømur til búfólkini. Tað fer vónandi at fáa tey at kenna hetta meira sum teirra egna heim. Nú hava tey jú møguleika at bjóða fólki inn til sín sjálvs, heldur enn inn í eina felags stovu, har onnur fólk eisini eru samstundis, sigur Jóhanna Hansen, leiðari á báðum stovnunum.

Búfólkini í sambýlinum skulu sjálvi, saman við starvsfólkunum, avgera hvussu teirra gerandisdagur kemur at síggja út. Hetta verður gjørt við regluligum húsafundum, har tey menningartarnaðu sleppa framat við teirra uppskotum um, hvat skal fara fram á stovninum.

À bústovninum fyri børn og ung við autistiskum breki verða tað tó í størri mun starvsfólkini, ið koma at skipa fyri einum regluligum gerandisdegi. Her verður tikið útgangsstøðið í tí einstaka búfólkinum, og er endamálið at nøkta tørvin hjá teim fýra fastbúgvandi.

Tilsamans 15 starvsfólk koma at verða á stovnunum, harav tvey hjálparfólk og 13 pedagogar.

Ì gjár kundu búfólkini so spakuliga byrja at flyta inn í teirra egnu íbúð. Men enn er nógv, ið skal fáast upp á pláss. Gardinur skulu upp at hanga, køksting skulu inn í køkin og so víðari. Júst, sum vit sjálvi kenna tað, tá vit skulu flyta inn í okkara egna.

Hetta tekur alt tíð, men á Bústovninum og Sambýlinum við Mýrivegin í Klaksvík vænta tey, at tey 10 búfólkini øll skuldu verið komin uppá pláss seinast í hesum mánaðinum.

Ì fleiri ár hava tey menningartarnaðu í Klaksvík ikki havt aðrar bústaðarmøguleikar enn umlættingarheimið Dáin, sum varð tikið í nýtslu í 1989.

Ì byrjanini hevði Dáin fimm pláss, men var hetta alt ov lítið til at kunna nøkta tørvin hjá teim menningartarnaðu í Norðoyggjum.

Tí setti Dáin eisini eina dagumlætting á stovn, sum børn við ymiskum tørvi kundu gera nýtslu av, samstundis sum ein drongur við autistiskum breki eisini búði fast á staðnum. Men enn var hetta alt ov lítið.

À heysti í 1997 var tískil fundur hildin í Klaksvíkar Kommunu, har umboð fyri Almannastovuna, Serstovnadeildina, Javna, Dáan og ein arbeiðsbólkur luttóku.

Hesin arbeiðsbólkur var fyrr í 1997 settur við tí endamáli at kanna, um ikki ein bústovnur ella eitt sambýli kundi setast á stovn í Klaksvík.

À hesum fundi kom eisini fram, at tørvur var á fleiri bústovnum í Klaksvík, og varð heitt á kommununa um at gera nakað ítøkiligt við hetta mál.

Hetta varð tikið til eftirtektar, og setti táverandi landsstýrismaðurin í Almanna- og Heilsumálum eina bygginevnd at koma við einum uppskoti og eini kostnaðarmeting. Eftirfylgjandi landsstýrismenn hava hildið áfram við hesum arbeiði, og týsdagin í seinastu viku kundi bygginevndin handa Sámal Petur í Grund, núverandi landsstýrismanni í Almanna- og Heilsumálum, sjálvan stovnin.

Móttøka var hildin í hesum sambandi, og var heilt fitt av fólki møtt upp til sjálva handanina.

# DM í tipping

FÓTBÓLTUR/TIPPING
*Solby A. Eliasen*

Nógvir føroyingar tippa hvørja viku í kapping um at gerast danmarkarmeistari. Tað eru umleið 14.000 luttakarar tilsamans. Okkurt um 70 føroyingar luttaka.

Kappingin er skipað soleiðis, at tað eru lokalkappingar, tað vil siga, at tað eru 36 luttakarar úr Klaksvík, 29 úr Tórshavn, tað eru eisini luttakarar av Tvøroyri, men av tí at teir eru færri enn 10, so eru teir saman við Keypmannahavn. Tann besti eftir 12 vikur fær eitt 10 túrakort fyri 2 til Englands at hyggja eftir Premier League dystum. Allir lokalvinnarar kappast aftaná í eini lokalfinalu í móti hvør øðrum, og vinnarin fær eina vikuskiftisrundferð til Týskland, England og Italia at hyggja eftir fótbólti á hægsta stigi í Evropa.

Henda kapping er ígjøgnum Dansk Tipstjeneste, og eru tey nú komin til 11. viku av teimum fyrstu 12. So avgerðin fellur í komandi viku.

**Støðan undan seinasta umfari:**

| **Tórshavn:** | **Stig:** |
|---|---|
| Finnur Helmsdal | 106 |
| Rúni Mortensen | 105 |
| Magni Hansen | 103 |
| Wenzel. P. Husgaard | 102 |
| Súsanna Winther | 100 |

| **Klaksvík:** | **Stig:** |
|---|---|
| Karstin | 105 |
| Klávus Bjartalíð | 102 |
| Gunnar á Steig | 102 |
| H.P.Z. Jacobsen | 102 |
| Àsmund Reyðberg | 100 |

Í kappingini í Keypmannahavn er ein tvørámaður, sum eitur Dion Petersen á øðrum plássi, eitt stig aftan fyri oddamannin.


Í Býin

FØSTULÁVINTS Vikuskifti:
Fríggjakvøldið:
FAXE - HAPPY HOUR
1600 TIL 1900
Ókeypis Ábit.
Leygarkvøldið:
FAXE - GRAND PRIX:
1700-2100
FAXE Double-up
Manhattan
PUB & CAFÉ
Sverrisgøta • Tórshavn
Tel 31 96 96
Har VIT hittast
BEINLEIÐIS:
Seria A, Premier League, Champions League og annar altjóða fótbóltur

fk Matseðilin
Hósdagin 7. feb.: Kalkungrýta
Fríggjadagin 8. feb.: Høsnarungar
Leygardagin 9. feb.: Oksasteik
Mánadagin 11. feb.: Medistarpylsa
Týsdagin 12. feb.: Knettir
Mikudagin 13. feb.: Skipperlabskovs
***
Seinnaparts-TILBOÐ frá kl. 14.00:
Juniorburgari 19,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 25,00
Matstovan í Hoyvík

Kaggin
Fríggjakvøldið
Føroyskur Dansur
Leygarkvøldið spælir
Basalt
www.kaggin.fo


fríggjakvøldið 08/02 Ladies Night
DJ Ottar
Happy Hour til kl. 1.00
leygarkvøldið 09/02
DJ Allan Poulsen
20 ára aldursmark
PLATFORM
discoteque

Í Býin

ÚT AT ETA -
Lat okkum um Uppvaskið:
MENU VIÐ 3 RÆTTUM
Einans 195,00 kr.
RIO BRAVO
Tlf 319767
RESTAURANT

Rækjubland
Angus-búffur við pipar- ella Bernaise-sós
Ís-dessert
195,00 kr
Borðbílegging á tlf. 319767
Casablanca
Ristorante

Casablanca suppa
Grillaður Lambsryggur
Arabbiata
Ísur Tricolora
195,00 kr
Borðbílegging á tlf. 319696

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil - ring 311234
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO
311234

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Fríggjadagin 8. februar
• "Fimmari"
• Sjavskapping verður kl. 19.00
UNDIRHALD
Leygardagin 9. februar
• Opið frá kl. 22.00
• Føstulávintsansur frá kl. 24.00-04.00
"NJÁL & MOURITZ" spæla

Felagið Tórshøll
Hetta vikuskiftið spæla
Sólva & Bergmenn
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er livandi tónleikur
Sunnudagin verður sjavskapping kl. 15.00
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

HOTEL ØRAVÍK ***
Matstovan bjóðar
Hvørt fríggja- og leygarkvøld:
-Rækjubland
-Enskan el. franskan búff
*Bert......155,-*
Hvønn sunnudag millum kl. 12.00 og 15.00
-Suppu
-Steik
-Dessert
*Bert......128,-*
Borðbílegging á
Tlf.: 37 13 02
Fax: 37 20 57

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið :
• Vetsm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vetsm. kl. 00.30
• Vetsm.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 286254

Hafnia Lounge
· Stórt úrval av kaffi
· Dagsins køka
· Sandwich
· Flógv terta við salati
· Ymisk "snacks"
· Smyrjibreyð frá kl. 14-17
(aftaná kl. 17 eftir áheitan)
Upplatingartíðir
*Sunnudag - hósdag*
Opið kl. 14.00-24.00
*Fríggjadag & leygardag*
Opið kl. 14.00-01.00
Tlf. 31 32 33 · Fax 31 52 50


HESA VIKUNA
Hóskvøldið
DJ Kristin Jensen
Fríggjakvøldið
ladies night & Happy Hour til kl. 1.00
DJ Martin Kjærbo
Leygarkvøldið
DJ Marjon Petersen
Grýludansur við vinningum til 3 tær flottastu grýlurnar
Fótbóltur á stórskíggja
Café'in hevur opið mán.-frí. 17.00-24.00 og leyg.-sun. 14.00-24.00
Club 20 Café
EISINI TANN BESTI Í LANDINUM
Írskur búffur v/chips, salat & whiskeysós
69,-
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo

PITABREYÐ v/ oksakjøt 55,-
TOAST v/ salat 25,-
SUPPA & BREYÐ 35,-
Allir 3 rættirnir kunnu keypast við út úr húsinum
**Frá mánadegnum 4. februar er opið soleiðis:**
Mánadag - hósdag 12.00-24.00
Fríggjadag - leygardag 12.00-01.00
Sunnudag 14.00-24.00
NATÚR
Tlf. 31 26 25